

# At finna høpi í lockdown:
# Ein kanning av korona dagbøkum

Erika Anne Hayfield

# Yvirlit

- Granskingarspurningar
- Kanningarháttur
- Ástøðisgrundarlag
- Úrslit
- Niðurstøða



# Granskingarspurningar



Tá Føroyar vórðu afturlatnar (lockdown) vórðu fólk kastað út í eina kreppu við óvissu og hóttanum.

Granskingarspurningar:

- Hvønn mótstøðuførisatburð sýndu føroyingar í fyrstu tíðini av COVID-19 farsóttini?
- Hvønn leiklut hevur mentan, lítilleiki, globalisering og stað á mótstøðuføri?

# Kanningarháttur

| Aldur | Kvinnur | Menn | Samlað % |
|---|---|---|---|
| 20-29 | 4 | 1 | 10% |
| 30-39 | 4 | 4 | 16% |
| 40-49 | 11 | 1 | 23% |
| 50-59 | 11 | 4 | 29% |
| 60-69 | 5 | 2 | 14% |
| 70+ | 3 | 1 | 8% |
| Samlað | 38 (75%) | 13 (25%) | 51 |




- Dagbókakanning (einstaklingastig)
- 51 dagbókur, samrøður við ein triðing
- Fyrimunur við dagbókakanning: Vísir á prosess og amboð at dokumentera eina kreppu ímeðan hon fer fram
- Vóru biðin um at skriva:
  - Hvørjar tankar og kenslur tú hevur í hesi tíð.
  - Hvørjar eygleiðingar tú gert - hvat leggur tú til merkis?
  - Hvussu henda støðan ávirkar títt lív (t.d. sambond við onnur, hvat tú gert í gerandisdegnum).
  - Annað, sum fyri teg kennist viðkomandi at skriva um.
- Constructivist grounded theory (Charmaz, 2009; 2014)

# Ástøði

Cosmology episode

Mótstøðuføri

Mótstøðuførisstig í cosmology episode

# Cosmology episode

COVID-19 kreppan elvdi til umveltning/órógv av so alstórum týdningi, at tað kann sigast at vera ein “cosmology episode” (Weick, 1993)

Alt tað, vit kenna, verður ókent og løgið.

Vu jàdé - mótsatt déjà vu. Eg havi ongantíð verið her áður, veit ikki hvar eg eri og havi ongan varhuga av, hvør kann hjálpa (umsett úr Weick, 1993: 633-634)

*A cosmology episode occurs when people suddenly and deeply feel that the universe is no longer a rational orderly system. What makes such an episode, so shattering is that both the sense of what is occurring and the means to rebuild that sense collapse together.*



# Mótstøðuføri

- Evnini at yvirliva og springa uppaftur ella meira neyvt at springa *fram* til ein nýggjan normalitet, sum blívur definerað út frá avleiðingunum av kreppuni (Cox & Perry, 2011)









# Mótstøðuførisstig í *Cosmology Episodes* (O'Grady & Norton, 2016)



# Mótstøðuførisprosessir






# Orða

## Hvat er hetta fyri ein støða?

- Einki nøktandi mál at reflektera um støðuna. Brúktu søgur at definera hendingina, íroknað skaldsøgur, søguligar hendingar og persónar, songtekstir, dreymar. T.d. Palle

*Komu til DK í gjár. Tað var næstan eitt sjokk. Eingin annar var á flogvøllinum uttan vit sum komu við hesum flogfarinum , eingin við bagagubandið , eingir (= 0) taxabilar uttanfyri. Eg filmaði og tók myndir, alt var sum eitt spøkilsisscenarium.*
47, kvinna, 40-47 ár

Støðu

Palle gaar ind i alle Forretninger, og der er slet ingen Mennesker — de er væk allesammen.

Palle gaar ogsaa ind i en Chokolade-butik og spiser noget Chokolade.

Han ved godt, at det maa man ellers ikke, men nu er han alene i hele Verden, og saa gør det ikke noget.





# Eyðmerkja
## Hvør eri eg í hesum?

- At sooma inn og út: Kosmopolitiserandi og lokaliserandi

  *Óhugnaligar myndir av kaotiskum sjúkrastovum, starvsfólki í maskum og tómum gøtum er gerandis. Uppá ein máta virkar tað so óveruligt, og samstundis sera nærverandi. Okkara egnu føroysku tøl eru einki í mun til teirra, sjálvt um vit eisini hava nýggj smittað hvønn dag. Men síggja vit bara inn í okkara egnu framtíð, tá vit hyggja at Italien? Nei, eg rokni ikki við tí, tí vit virka at vera millum tey seinastu í køini, so vit hava havt møguleika at reagera og handla skjótari. Sig so tað, meira enn so onkuntíð er tað ein fyrimunur at vera aftarlaga í køini. Men tá alt kemur til alt, finst einki "vit" og "tit". Vit eru Italien, Italien er vit. Vit hanga saman øll somul.* 45, Kvinna, 50-59 ár

- Tekna linjur aftureftir. Hvaðani komi eg?
  - Fara støð, har forfedrar/familja kemur frá
  - Reflektera um ættarlið undan tey
  - Geva søgur víðari til børn og ommu/abbabørn
  - Droyma um foreldur, sum eru deyð






- *Tað var sjáldsamt at síggja mammu – hon doyði tá ið eg var 25 – eg havi ikki droymt um hana fyrr, haldi eg, havi ofta droymt um pápa, sum doyði nógv seinni, sum gamal maður. Tað var deiligt at síggja mammu í dreyminum.* (24, Kvinna, 60-69)



*Vit í Føroyum hava tann fyrimun, at vit lættliga kunnu finna støð uttan at møta so nógvum fólki, tað eru ikki somu umstøður í heimsins mongu stórbýum, haðani vit javnan síggja fólkafjøldirnar trunkast á vegunum.*
(57, Kvinna, 60-69 ár).

*Mamma mín er ikki typan, sum leggur so nógv í at fylgja tropp. Men í hesum døgum kann tað nokk fáa avleiðingar at lata vera. Sjálvt um ikki tú verður settur fastur, tí lógarverkið enn ikki er komið til tað, so hava vit sterkan sosialan kontroll.* (52, Kvinna, 40-49 ár)

# At skapa støðufesti og finna uppá

## Hvussu kunnu vit vera í hesum?

- I kaos og óskipan inniber mót
  við tað, sum er stabiliserand
  - Landsstýri og Farsóttarr
  - Sosialt kontrol
  - Náttúran (fjøllini, útilív, dj

*Várharra troystar okkum við at lata sólina skína allan henda fagra leygardag, og alla staðni eru fólk úti: í fjøllunum, á gøtum og á ítróttarvøllum. Tað lívir fyri høgættini, og hópur av fólki spákar framvið, tey veittra og vit veittra aftur, men eru blindaðar av sólini, so vit ikki vita, hvønn vit veittra til.*
68, Kvinna, 70-79 ár

# At hittast “the Corona way”



# At visjonera og endurskapa

## Hvussu kunnu vit liva eftir hetta? Hvør er framtíðin?

- Vit kunnu skipa okkum vit hava kontinuitet (Feldman et al., 2021): Tekna eina linju inn í framtíðina og endurvitja fortíðina, aftureftir og frameftir
- Hví hendi hetta og hvat kunnu vit læra? (kapitalisma, dálking, hópferðavinna, materialisma, revsing frá Gudi) Sitat

*…nú verjir náttúran seg ímóti menniskjum, at jørðin nú er so mikið sperd, at hon má rudda út millum menniskju. Nú hava menniskjuni so leingi útpínt og uppbrúkt alt á klótuni, at klótan er desperat. Eins og fólk fáa andaneyð av corona, hevur havið andaneyð av plasti og klótan andaneyð av royki. Klótan ger eitt átak. Hetta virus er jú ein vera í nattúruni akkurát sum vit. Tað er sloppið leyst av okkara átufreka grammleika og leikar nú leyst um allan heim. Kanska vit læra av hesi kreppu, at flúgva minni, hava smærri býir, færri ferðafólk, lata vill dýr fáa frið.*

24, Kvinna, 60-69 ár *Link*

# At visjonera og endurskapa

## Hvussu kunnu vit liva eftir hetta? Hvør er framtíðin?

- Vit organisera okkum tá vit hava kontinuitet (Feldman et al., 2021): Tekna eina linju inn í framtíðina og endurvitja fortíðina, aftureftir og frameftir
- Hví hendi hetta og hvat kunnu vit læra? (kapitalisma, dálking, ferðavinna, materialisma, reving frá Gudi)
- Kosmopolitierandi: Kenna skomm vegna menniskjaættina (eksitentiella skuldarkenslu)
- Ótti (sum er rættaður móti onkrum luti, viðurskifti, menniskja, vera (Stone, 2017)):
    - *Eg havi hugsað um deyðan. Eg kenni tað sum hann stendur uttan fyri dyrnar og roynir at síkja seg inn hvørja ferð hurðin fer upp. Og hundurin pissar allatíð so hon gongur ofta, hurðin. Eg veit at eg fái møguliga ikki viðgerð um eg verði sjúk. Men øll skulu doyggja. Eg vil ikki doyggja nú, men eg havi góðtikið at møguleikin nú er til staðar. Man er nokk tað sama, tá man er deyður, sum tá man ikki er føddur. Eg saknaði ikki lívið, áðrenn eg var født, og eg fari ikki at sakna tað, tá eg eri deyð.* (69, Kvinna, 30-39 ár)
- Angest (Kirkegaard)
    - Liva meira autentiskt

*…vi må huske at vi har en klode hvor vi alle lever på, at vi alle er verdensborgere. Mit ønske er, at vi først og fremmest vil uddanne vores verdenborgere til at være "VISE" verdensborgere… krop, sjæl og ånd med et samfundsind eller jeg vil sige med et verdenssind- fordi vi er alle i samme båd og må alle sammen bidrage til en bedre verden for os og alle der bor på denne klode*

62, Kvinna, 60-69 ár

# Niðurstøða

- Stað og kontekst hevur týdning fyri mótstøðuføri
- Fólk finna høpi við áhaldandi at sooma inn og út, frá tí globala til tað lokala
- Luttakarar endurnýggjaðu relatiónir við stað og broyttu staðsans (sense of place)
- Lokalt sjálvræði hevur týdning
- “Islandness” er við til at geva eina trygdarkenslu




Takk fyri

# Keldur


- Charmaz, K. (2009). Shifting the grounds. In J. M. Morse, P. N. Stern, J. Corbin, B. Bowers, K. Charmaz, & A. E. Clarke (Eds.), Developing grounded theory: The second generation (pp. 127–154). Left Coast Press Walnut Creek (CA).
- Charmaz, K. (2014). Constructing grounded theory. Sage.
- Cox, R. S., & Perry, K. M. E. (2011). Like a fish out of water: Reconsidering disaster recovery and the role of place and social capital in community disaster resilience. American journal of community psychology, 48(3), 395-411.
- Cresswell, T. (2021). Valuing mobility in a post COVID-19 world. Mobilities, 16(1), 51–65.
- Feldman, M. S., Worline, M., Baker, N., & Lowerson Bredow, V. (2021). Continuity as patterning: A process perspective on continuity. Strategic Organization, 14761270211046878.
- Orton, J. D., & O'Grady, K. A. (2016). Cosmology episodes: A reconceptualization. Journal of Management, Spirituality & Religion, 13(3), 226–245.
- Weick, K. E. (1993). The collapse of sensemaking in organizations: The Mann Gulch disaster. Administrative Science Quarterly, 628–652.



# Saman-hangurin

- Afturlating 15. mars til byrjan í mai 2020
- Bert tilmæli, ikki lóggáva
- Koronakanningar greinaðar í Føroyum, ókeypis og kanningar við landamørk
- Lutfalslig fríheit at vera mobil
- Alheims farsótt, men staðbundnar upplivingar
- At vit eru oyggjasamfelag hevði týdning (t.d. endurnýttu tól til laksavirus)